# egging sparir askinurnar



Jón Rasmussen sigur, at skipanin er roynd í nøkur ár við skering av sild, og her vísir hon seg at rigga ógvuliga væl
Mynd: Mourits M. Joensen



*Nýggj amerikansk tøkni við sjálvvirkandi íleggjara og kamera verður nú roynd við svensku VMK-maskinunum umborð á verksmiðjuskipinum Norðborg*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ein av monnunum aftanfyri Christian í Grótinum og Norðborg, sigur, at tveir amerikumenn í løtuni eru umborð á Norðborg og seta upp eina telduskipan við kamera til hvørja av hesum skerimaskinum.

– Henda skipan hevur verið roynd í eina tíð við ymiskum fiskasløgum – og hon er eisini roynd umborð á skipum, sum vit arbeiða saman við.

Jón vísir á, at nýggja amerikanska skipanin við teldustýrdum og sjálvvirkandi íleggjara tykist rigga væl.

– Tað, sum amerikumenn hava gjørt, er, at teir í fyrsta lagi hava ment "føðingina" til maskinurnar betri, soleiðis at fiskurin í størst møguligan mun vendir rætt, tá ið hann kemur oman á skálirnar.

Hann sigur, at kameraði „hyggur" niður á fiskin og sigur frá, um fiskurin vendur skeivt. Um so er, fer hann ikki gjøgnum skerimaskinuna, men aftur pavnin og soleiðis einaferð runt aftrat.

– Kameraið boðar eisini frá, um fiskurin er skaddur. Er hann skaddur, verður hann skumpaður úr skipanini og fer til slógv. Tá fer hann ikki aftur í pavnin og runt aftur í skipanini.

### Óført til sild

Jón sigur, at nýggjan tøknin riggar ógvuliga væl til skering av sild, og í so máta hevur skipanin verið roynd í nøkur ár.

– Norðhavssildin liggur um eini 300 g., meðan svartkjafturin liggur millum 100 og 120 g. Haraftrat kemur, at fiskurin ikki er eins skaptur. Vit vænta tó, at nýggja amerikanska tøknin eisini fer at rigga væl í svartkjaftaframleiðsluni, sigur hann.

Avgerandi er eisini, at fiskurin er feskur og góður.

Jón Rasmussen sigur, at nú verður nýggja skipanin sett upp umborð á Norðborg, og eingin ivi er um, at skipið, sum P/F Hvalnes letur byggja í Kili, eisini verður útgjørt við nýggju tøknini.

Sum skilst, tekur nýggja tøknin við sjálvvirkandi ílegging lítið pláss.

# Rundkoyring í Gøtudali

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialuri.fo*

At vegamótið í Gøtudali, har vegurin úr Leirvíkartunlinum kemur oman í landsvegin í Dalinum, er vandamikið, eru neyvan fleiri meiningar um. Økta ferðslan við Norðoyatunlinum ger tað ikki minni átroðkandi at fremja eina skjóta, skilagóða og ferðslutrygga loysn.

Nú Gøtu kommuna fer undir at byggibúgva ein part av Dalinum, norðanfyri tunnilsvegin og eystanfyri landsvegin, til vinnulig endamál, eigur Landsverk avgjørt at geva hesum vegamóti høga raðfesting.

Páll Isholm, borgarstjóri í Gøtu kommunu, sigur, at tey hava vónað, at ein rundkoyring fór at verða bygd í Dalinum í ár, men líkt er ikki til, at soleiðis verður.

– Men at rundkoyringin kemur komandi ár, ivist eg onga løtu í, sigur Páll Isholm.

